LÍF dagurin fór í fisk

2. deild: Stevnudámurin í Leirvík varð oyðilagdur, tá Gøtumenn lumpaðu seg fram til trý stig

Stevnuhýrurin hvarv í Leirvík, tá gøtumenn fóru við sigrinum í grannauppgerðini

LÍF–GÍ 1–2 (1–1)

Tá LÍF tey seinnu árini hevur spælt síðsta heimadystin í 2. deild hava teir hav tað, sum teir kalla LÍF dag. Tá skipa tey í Leirvík fyri inntøkuskapandi tiltøkum, og steyp verða latin vinnandi liðunum.

Sambært skipanini skuldu GÍ og LÍF síðsta leygardag havt spælt í Gøtu. LÍF eigur ein heimadyst eftir undan summarfrítíðini. Umstøðurnar lagaðu tað soleiðis, at teir kortini høvdu LÍF dag síðsta leygardag. Gøtumenn fóru gjøgnum bergholið, og hvat tí í-tróttarliga viðvíkur hilnaðist tað illa í 2. deild. Fyrrapartin vóru nógvir dystir á skránni í yngru deildunum. Tá gjørdist tað rættuliga ófantaligt. Seinnapartin stilti tað av, men tá vóru gøtumenn so ófólkaligir, at teir oyðiløgdu góða lagið í Leirvík. GÍ vann 2–1.

Í fyrra umfarinum hevði heimaliðið yvirvág, men teimum eydnaðist bara at fáa eitt mál. Petur Sjúrðarberg kom ígjøgnum í høgru, hann royndi at senda framvið leirvíkinginum í GÍ málinum, Halli Hansen, men málverjin hálvbjargaði. Bóltin støkk til Erik Lervig, sum takkaði fyri og skoraði.

Fimm minuttir fyri steðgin javnaði GÍ. Jan Skoradal skuldi royna móti málinum, tá beinini vórðu tikin undan honum. Dómarin bríkslaði fyri brotssparki, og úr ellivu metrum var spælandi ábyrgdarmaðurin hjá teimum næstbestu í Gøtu, Símun Petur Justinussen, púra tryggur.

Sum seinna umfarið leið var tað týðuligt, at LÍF legði alt meiri í álopspartin,

teir vildu so fegnri hava øll stigini. Teir fingu einki stig. Gøtumenn høvdu fleiri vandamikil snarálop, og tveir minuttir undan leikloki eydnaðist tað. Áslakur Nesá var arkitektur og avsluttari. Hann dróg skjótt í vinstru, spældi eitt tvey, fekk bóltin aftur og sendi framvið Trygva Olsen.

Og so endaði LÍF dagurin við, at øll trý stigini og steypið fóru ígjøgnum bergholið og steðagðu ikki á fyrrenn í Sarpigerði.

Komandi leygardag fáa leirvíkingar nýggjan møguleika á heimavølli. Tá kemur B36 til Leirvíkar. Sama dag skal GÍ til Klaksvíkar at spæla móti botnliðnum í næstbestu deildini. Málið hjá GÍ er í fyrstu atløgu at halda liðnum í deildini, og tað hevur higartil eydnast bara væl.

JH

LÍF-GÍ 1-2 (1-1)
1-0: Petur Sjúrðarberg
1-1: Símun Petur Justinussen (br.)
1-2: Áslakur Nesá

Hóast teir undan dysitnum vóru mettir sum favorittar, munnu runavíkingar helst vera fegnir um, at tað eydnaðist teimum at bjarga sær eitt stig, tá sandoyingar vóru stevnugestir

Mynd: J. Jacobsen

B71 tók luftina úr NSÍ

Tá sandoyingar í 2. hálvleiki vóru meiri framrættaðir, hóttu teir heimaliðið so mikið nógv, at teir vóru um reppið at fara við øllum stigunum

NSÍ-B71 1-1 (1-0)

Í framúr góðum fótbóltslíkindum býttu NSÍ og B71 leygarkvøldið stigini millum sín á Eystanstevnuni. Tá Suni Johansen bríkslaði fyri síðstu ferð, var tað týðuligt, at gestirnir vóru nøgdir við úrtøkuna, meðan teir á heimaliðnum ikki vóru nøgdir við at fáa eitt stig buturúr móti einum av liðunum, sum teir á heimavølli høvdu ætlað sær at fingið fulla úrtøku burturúr ímóti.

Fyri liðini í bestu føroysku deildini er tað ein stór uppgáva at standa fyri fótbóltsundirhaldinum aftaná, at áskoðararnir hava havt møguleika at síggja Portugal og Rumenia, og frammanundan at Ongland og Týskaland fara um skíggjan. Hetta vóru treytirnar hjá NSÍ og B71. Tí er tað væl hugsandi, at dómurin yvir stevnuavrikið hjá teimum í Runavík og teimum á Sandi verður ivaleysa harður.

At munurin í málum alla tíðina var so tepur, hevði tað við sær, at spenningurin varð varðveittur alla tíðina. Onkra løtuna fleyt spælið hampuliga væl, men tað kom meiri enn so fyri, at lætta loysnin at spørka í staðin fyri at spæla varð vald, og tað var ikki atlið, at temjingarnar og bóltførleikin annars var á tí støðinum, sum tað kann roknast við av teimum, ið undirhalda á hægsta støði í Føroyum.

NSÍ umfarið

Heimaliðið var nógv meiri ágangandi í fyrra umfarinum. Tað mesta gekk fyri seg á hálvuni hjá sandoyingum. Hetta komst fyri ein part av, at NSÍ vísti rættan hugburð. Teir vóru nógv meiri ágangandi, enn teir ofta hava verið, og teir arbeiddu væl fyri hvørjum øðrum.

Men tað komst eisini av, at B71 ikki legði so nógv í verjupartin frammarlaga á vøllinum. Sandoyarliðið pakkaði seg saman aftarlaga á egnari hálvu, og so dúvaðu teir upp á, at tað skuldi eydnast at senda langar bóltar fram til Eli Hentze og Michael Jørgensen, sum ofta vóru einsamallir frammarlaga á vøllinum.

NSÍ hevði fleiri góð álop, men tað var ikki ofta, at teir settu Valdemar Nowisci á tær stóru royndirnar. Ian Højgaard, Gert Langgaard, Dánial Hansen og eisini onkur annar høvdu fínar skotroyndir, men at tað var so tjúkt fyri frammanfyri B71 málið gjørdi, at royndirnar oftast vórðu blokerðar, áðrenn bólturin kom í málteigin.

Málinum, sum NSÍ fekk seint í 1. hálvleiki, bilti einki. Eftir deyðbóltsstøðu til B71, gjørdi NSÍ skjótt av. Ian Højgaard spældi Gert Langgaard leysan í høgru, innleggið kom til nærra stólpan, har Dánial Hansen, sum aftur hesa ferð var í álopinum, var so mikið leysur, at tað var løtt søk hjá honum við høvdinum at stýra bóltinum í málið.

At Dánial hesa einu ferðina var so leysur, mundi komast av, at B71 veteranurin, Ib Mohr Olsen, sum av álvara hevur spælt seg aftur á liðið, ikki var komin upp á pláss aftur, eftir at hann hevði verið frammi í sambandi við deyðbóltsstøðuna. Ib hevði annars gott tak á í luftkrígnum við Dánial Hansen.

B71 umfarið

At sandoyingar í fyrra umfarinum høvdu Eli Hentze á toppinum tóktist ikki so sannførandi. Veteranurin var í síni tíð skjótur og snildur álopsmaður. Í seinna umfarinum var Eli Hentze á miðvøllinum. Eli setti av álvara dám á spælið, og avrikið boðaði frá, at tað eru bóltførleikin og taktisku evnini á miðvøllinum, ið nú eru bestu dygdirnar, sum B71 eigur í Eli Hentze. Beint undan steðginum framdi B71 venjarin dupult-a útskifting. Alex Nielsen, sum hevði verið ivasamur, kom á vøllin saman við Jákupi Lamhauge, og hetta vísti seg at hjálpa væl upp á álopspartin.

Síðst í 1. hálvleiki var um reppið, at B71 javnaði. Julian Floresco, sum var sera eyðsýndur á miðvøllinum í vinstru, sendi fríspark úr átjan metrum omanfyri manngarðin og móti samankomingini, har Rúni Joensen bjargaði.

Eli Hentze javnaði við brotssparki. Alex Nielsen kappaðist uttarlaga í brotsteiginum í vinstru við Arnfinn Langgaard um stikkbólt frá Eli Hentze. Ivaleyst gjørdi B71 maðurin fríspark, men tað sá dómarin ikki. Og so legði verjuveteranurin mótstøðumannin niður. Tað sá dómarin, og Eli sendi brotsspark-ið framvið Kára Hansen, sum var farin í málverjubúnan, tá Rúni Joensen var so mikið plágaður av knæskaða, at hann kendi seg noyddan at fara av vøllinum.

Sum seinna umfarið leið, lá eitt B71 mál meiri í luftini enn eitt mál til heimaliðið. B71 samanspældi betri. Michael Jørgensen, sum er nýggi danin á framrættaða miðvallarplássinum hjá B71, vísti gott skil og hegni og hevði saman við Alexi Nielsen stóra tyngd. Størsta møguleikan fekk Michael Jørgensen, eftir at Høgni Hansen hevði sent innfyri, men stútarin úr stuttari fjarstøðu fór omanfyri málkarmin.

JH

NSÍ-B71 1-1 (1-0)
1-0: Dánjal Hansen 22.
1-1: Eli Hentze (br.) 56.

Dómari: Suni Johansen

NSÍ:
Rúni Joensen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Sjúrður Jacobsen – Sonni L. Petersen, Djóni N. Joensen, Ian Højgaard, Eddie Mikkelsen – Dánial Hansen, Gert Langgaard

B71:
Valdemar Nowisci – Høgni Hansen, Jógvan Jón Petersen, Ib Mohr Olsen, Bernhard Petersen, Hans Jørgen Djurhuus – Jón Brekku, Kári Nielsen, Julian Floresco – Michael Jørgensen, Eli Hentze

B68 var meiri enn heppið

Spurningurin tóktist vera, um GÍ fór at vinna, ella um toftamenn, sum onga luft høvdu eftir, fóru at varðveita javnleikin, men so heilkiksaði GÍ

GÍ-B68 1-2 (0-1)

Gøtumenn hingu við skuffuni, tá Birgir Sondum, sum aftur hesa ferð var sera sannførandi, hevði bríkslað fyri síðstu ferð. Og tað var ikki so undarligt, at lagið var vánaligt á GÍ. Helgi L. Petersen hevði við góðum stútara eftir langt innlegg úr høgru frá Rúna Justinussen javnað leiðsluna, sum B68 hevði frá fyrra umfarinum. GÍ málið var ein náttúrlig fylgja av stóra trýstinum, sum heimaliðið mest sum allan 2. hálvleik hevði lagt á B68.

Eftir útjavnandi málið helt GÍ á at trýsta. Beint eftir útjavnandi málið varð Rúni Justinussen spældur leysur inn um í høgru, men Magnus Poulsen, sum fyri tað mesta var stinnur í B68 málinum, kom langt út í brotsteigin og hálvbjargaði. Gøtumenn høvdu tað mesta av seinna umfarinum lætt við at leggja høgar bóltar úr høgru og í brotsteigin. Teir stríddu seg til fleiri hornaspørk, sum tað stóðuast spentar støður av, og tað líka sum lá í luftini, at teir skuldu fáa sigursmálð.

Óli Hansen var tætt við, Henning Jarnskor sendi uppum eftir fríspark frá Paula Jarnskor, og soleiðis kundu vit hildið á. Men GÍ fekk ikki mál, og fram móti endanum mundi tað kennast sum eitt stórt vónbrot, at teir tveittu alt fyri borð.

Avgerandi málið

Sigursmálið fekk B68 fimm minuttir undan leikloki. Tað var ein gáva frá Bartali Eliasen, sum var so harmur, at hann næstan ikki orkaði at lyfta seg upp aftur. GÍ hevði leingi tryst og kroyst B68 aftur á vøllin. Burtursæð frá einum langskoti, sum fór við síðuna av málinum hjá Sunvardi Joensen, høvdu toftamenn einki havt at bjóða uppá.

So var tað, at Øssur Hansen stakk ein flatan bólt fram í høgru, Marcello royndi eftir honum, men Bartal Eliasen fekk fult tamarhald á støðuni. Inntil hann í besta Jesper Olsen stíli av baklinjuni legði inn fyri málið, har bólturin fór framvið Sunvardi Joensen. Marlon Jorge setti innaru síðuna á, og gestirnir jubladu.

GÍ tveitti alt fram. Hans Pauli Petersen, sum var komin á vøllin, sendi langskot í tvørtræið. Hetta var tað næsta, sum heimaliðið kom útjavningini.

Onga luft

B68 hevði í fyrra umfarinum yvirtakið. Tað vóru møguleikar báðar vegir, men tað var bara B68, sum fekk úrtøku. Serliga í 1. hálvleiki var Øssur Hansen framúr (saman við Arnbirni Danielsen). Øssur átti mest sum alt málið, sum B68 fekk í 14. minutti. Fyrst dróg hann einar tríati metrar í vinstru, og so hevði hann yvirskot at senda neyvan krossbólt í høvdið á Súna Fríða Johannesen, sum takkaði fyri.

Í 1. hálvleiki hingu keturnar hjá B68 fyri tað mesta hampuliga væl saman. Í 2. hálvleiki var tað heilt galið. Liðið varð togað sundur, og tað var heilt eyðsýnt, at nógvir av spælarunum ikki høvdu orku at fylgja við í verjupartinum, og álopsparturin var so at siga burtur. Miðvøllurin varð liðaður av um tvøran, og í borðunum var lætt hjá GÍ at koma ígjøgnum.

At GÍ í 2. hálvleiki ikki megnaði at fáa úrtøku burturúr, sum gav teimum øll stigini, var fráboðan um, at í løtuni eigur GÍ ikki eitt lið, sum kann hugsa um annað, enn at sleppa undan botninum. Toftamenn høvdu einki at bjóða uppá í 2. hálvleiki, men teir fingu øll stigini. Tað var heppið, tá mett verður út frá avrikinum, og tað kom væl við. Ikki minst tá havt verður í huga, at Fróði Benjaminsen og Jan C. Dam ikki vóru við, umframt Jákup Eli Olsen, sum tað verður leingi at bíða eftir.

JH

GÍ-B68 1-2 (0-1)
0-1: Súni F. Johannsen 13.
1-1: Óli Hansen 65.
1-2: Marlon Jorge 85.

Dómari: Birgir Sondum

GÍ:
Sunvard Joensen – Bartal Eliasen, Áslakur R. Petersen, Martin Thomsen – Rúni Justinussen, Helgi L. Petersen, Magni Jarnskor, Pauli Jarnskor, Súni Olsen – Óli Hansen, Henning Jarnskor

B68:
Magnus Poulsen – Mannbjørn Nesá, Arnbjørn Danielsen, Jákup Djurhuus – Jan Petersen, Marlon Jorge, Øssur Hansen, Eyðstein Skipanes, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

B68 kunnu undir umstøðum sigast at vera óhepnir. Fyri tveimum vikum síðani fingu teir sigursmálið forerandi frá HB í seinastu minuttunum av dystinum í Gundadali, og sunnudagin vóru gøtumenn eisini í gávuhýri

Savnsmynd

Abraham Hansen hevur enn ikki gloymt, hvussu ein miðvallarovasti skal stýra monunum kring seg

Mynd: J. Jacobsen

NSÍ heldur kósina

2. deild: Í mun til besta mansliðið í Runavíkini, teljast teir næstbestu millum oddaliðini í sínari deild

NSÍ–Royn 3–2 (1–0)

Næstbesta liðið hjá NSÍ megnar tað, sum besta liðið hevur meiri enn ilt við at klára. Teir spæla seg til málmøguleikar, teir skora mál, og teir vinna dystir og tey stigini, sum hava við sær, at teir eru við, har tað gongur fyri seg.

Á stevnuni høvdu teir heilt tíðliga seinnapartin vitan av Royn. Tað var hesa løtuna, at veðrið var vánaligt. NSÍ hevði vindin undan í 1. hálvleiki. Teir høvdu yvirtakið, men tá fingu teir ikki stóra úrtøku. Bergur Hansen, sum var á miðvøllinum í vinstru, hevði tvey góð langskot, men Lars Müller, sum hesa ferð vardi málið hjá Royn, bjargaði væl.

Einar tíggju minuttir undan steðginum kom hol á. Christian Høgni Jacobsen, sum nú fríggjadagin skal leggjast undir skurð, tí trupulleikarnir við knænum eru so stórir, skoraði. Málið kom eftir horna úr vinstru, sum sigldi omanfyri allar og út móti brotsteigarsamankomingini í handara borðinum. Christian Høgni smekkaði til, og bólturin tók handara stólpan uppi undir samankomingini.

Royn legði bragdliga fyri undan vindinum, men tað stóðst einki burturúr, og tá NSÍ, sum hevði Abraham Hansen sum miðvallarovasta og Elian Hansen sum stóra arbeiðsorku við síðuna av honum, hevði skorað tvey mál afturat, tóktist tað sum alt vard avgjørt.

Chrstian Høgni Jacobsen økti til 2–0. Hann var fyrstur á fløtum innleggi úr vinstru, har Áki Leitisstein Hansen og Bergur Hansen høvdu staðið fyri uppspælinum. Triðja málið var meinlíkt tí næsta. Hesa ferð var tað Christian Høgni Jacobsen, sum legði innfyri, og Høgni á Lakjuni skoraði.

Kanska tóku teir á heimaliðnum og lætt upp á tað síðstu løtuna, og so vóru teir orduliga kløkkaðir av hvalbingum, sum m.a. líða undir, at Zoran ikki fær spælt. Birgir Jørgensen minkaði um munin, tá tíggju minuttir vóru eftir. Hann stútaði innlegg úr høgru í málið. Málið gav Royn blóð á tonna, og tríggjar minuttir undan leikloki skoraðu teir aftur. Birgir Jørgensen er ikki í tí venjingarstøðu, sum hann onkuntíð hevur verið, men málevinum bilar einki. Hesa ferð var hann eitt sindur heppin. Eftir at bólturin var stungin inn um verjuna, royndi hann við skoti, sum neyvan hevði givið Ólavi Højgaard stórvegis høvuðbríggj, um bólturin ikki hevði tikið í beinið á Dan Knudsen og harvið hevði snýtt málverjan.

JH

NSÍ-Royn 3-2 (0-1)
1-0: Christian Høgni Jacobsen
2-0: Christian Høgni Jacobsen
3-0: Høgni á Lakjuni
3-1: Birgir Jørgnsen
3-2: Birgir Jørgensen